# Umhugsar endurgjald




*Almanna- og heilsumálaráðið má nú fyrireika seg at enda í rættinum, har tað verður kravt at betala endurgjald*

**Nú Løgtingsins Umboðsmaður er komin til ta niðurstøðu, at tað var ólógligt at siga hann upp, fer Jóan Petur Davidsen, yvirlækni, helst at krevja endurgjald**

ALMENN UMSITING OG UPPSAGNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er púra greitt, at eg fari víðari við málinum.

Jóan Petur Davidsen, yvirlækni, er væl nøgdur við, at Løgtingsins Umboðsmaður er komin til ta niðurstøðu, at tað var ólógligt at koyra hann frá sum leiðandi yvirlækna á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum.

Og í stuttari viðmerking ger hann púra greitt, at málið endar ikki her, men at hann fer víðari við.

– Løgtingsins Umboðsmaður kemur til ta greiði niðurstøðu, at í hesum málið er tænastumannalógin, fyrisitingarlógin og øll vanlig sømiligheit skúgvað til viks.

– Niðurstøðan er heilt greitt, at lógliga eri eg ikki koyrdir frá sum leiðandi yvirlækni. Og tað má so eisini merkja tað, at eg eigi løn sum leiðandi yvirlækni hetta seinasta árið, síðani eg var ólógliga frákoyrdur.

Jóan Petur Davidsen sigur, at tað er í øllum førum væntar hann, at hann fer at stevna Almanna- og Heilsumálaráðnum, har hann fer at krevja endurgjald fyri skaða og skamm.

Annars sigur hann, at hann skal tosa við sakførara sín í vikuni um, hvussu farast skal fram hereftir.

Tað eydnaðist hvørki at fáa eina viðmerking frá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna-og heilsumálum, ella frá Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra.

Les meiri á síðu 7.

Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir

## verkfrøðingi/byggifrøðingi

Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:

- Tilboðsrokning
- Fyrireiking av byggimálum
- Projektleiðsla
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar til tílík arbeiðir, er ein treyt.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

*P/F Articon*
*Postboks 3109*
*110 Tórshavn*

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. novembur 2006.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

ARTICON
[illegible]

Articon-samtakið, sum eisini fevnir um Byggi-Service, er ein byggifyritøka í støðugari menning. Feløgini takast við alt slag av byggi- og anlegsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 100 fólk hjá feløgunum báðum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvogns-førarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk. Feløgini hava skrivstovu í Tórshavn.

Sosialurin
Sosialurin
i

